

og komu upp í 4215 metra hædd. Hetta staðið verður rópt á enskum "Dead Woman's Pass". Har steðgaðu tær eina góða løtu, og ein meksikanari tók myndir av teimum.

– Okkum varð mælt til at koma oman aftur beinanvegin, men vit høvdu ongar trupulleikar av tunnu luftini. Onnur fingu hæddarsjúku.

– Vit gingu so oman eftir aftur gjøgnum trappur, og tá møttu vit einum ísraela, sum visti um Føroyar frá fótbólti. Tað var nokkso stuttligt. Sum heild hava vit gjørt nógva reklamu fyri Føroyum sum ferðalandi. Allastaðni fortaldu vit um Føroyar.

## Ótu sum menn

Tær vóru gorhungraðar, tá ið tær komu fram, har tær skuldu gista.

– Tað kvøldið fingu vit ein deiligan døgurða, men vit skiltu ikki, hví hini ikki ótu líka nógv sum vit. Kanska vóru tey meira kræsin.

Eftir at hava fingið at eta um kvøldið, sótu luttakararnir bara og prátaðu um alt millum himmal og jørð. Hini hildu tað vera stuttligt, at norsku genturnar og tær báðar kundu tosa felags mál. Annars varð mest tosað enskt. Tær báðar lærdu tó nakað av sponskum hesar dagarnar.

Meðan tær gingu, tugdu tær nøtir og rosinur, sum teimum varð viðmælt, men at enda kvaldust tær av hesum. Vatn máttu tær drekka alla tíðina. Tað kundu tær fáa á vegnum.

Tær gingu stórt sæð í somu klæðum alla tíðina, men tað løgna var, at klæðini ikki blivu skitin. Tað mundi vera tí, at tær ikki sveittaðu.

Triðja kvøldið var lagið heilt serligt.

FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU